# Fylgdi harraboðum frá starvsnevndini

**Kappingarstjórin hjá HSF, Jógvan Martin Mørk, sigur, at eftir at hann í heyst hevði lagt Sunset-kappingina við sjey liðum, fekk hann boð frá starvsnevndini um at broyta hetta til átta lið og koyra Tjaldur uppí**

SUNSET-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Eftir at hava lagt Sunset-kappingina við sjey liðum, fekk kappingarstjórin hjá HSF, Jógvan Martin Mørk, boð frá starvsnevndini um, at átta lið skuldu verða við, og tí skuldi kappingin leggjast av nýggjum.*

*savnsmynd*

Í gjár segði Geir Wardum, kyndlavenjari, her í blaðnum, at hann heldur Sunset-kappingina verða eina skandalu í ár, og at rættast hevði verið, um restin av kappingarárinum bleiv strikað, og at Stjørnan og VB bara spældu sínar írestandi innanhýsis dystir fyri finna føroyameistaran.

Kappingarstjórin hjá HSF, Jógvan Martin Mørk, sigur í hesum sambandi, at hann á fundi við feløgini í januar mánað beint undan endaspælinum legði fram eitt broytingaruppskot, sum hevði stytt um longdina á kappingini.

### Finalubólkur og niðurflytingarbólkur

Uppskotið hjá Jógvan Martin gekk út uppá, at tey átta liðini í Sunset-kappingini blivu býtt í helvt, heldur enn at farið var undir ætlaða endaspælið.

– Eg skeyt upp, at fýra tey ovastu liðini spældu í einum finalubólki um heiðursmerkini, soleiðis sum vit eisini kenna tað aðrastaðnis frá.

Fýra tey niðastu liðini skuldu so spæla um at sleppa undan niðurflyting. Eg skeyt upp, at tey bæði liðini, ið endaðu aftast í niðurflytingarbólkinum, fluttu niður í næstfremstu deildina. Hetta hevði merkt, at tað einans vóru seks lið í Sunset-kappingini komandi kappingarár, og tað hevði eisini havt við sær, at kappingin ikki gjørdist so drúgv, sigur Jógvan Martin Mørk.

Tá ið so kappingarárið 2005/2006 var komið hálvan veg, skuldu fýra tey ovastu av teimum seks liðunum, sum tá vóru í Sunset-kappingini, spæla í einum finalubólki, meðan tey bæði niðastu skuldu dystast við tvey tey ovastu úr næstfremstu deildini um tvey pláss í Sunset-kappingini árið eftir, greiðir kappingarstjórin hjá HSF frá.

### Góð undirtøka fyri uppskotinum

Jógvan Martin Mørk greiðir frá, at tað var góð undirtøka fyri uppskotinum millum møttu feløgini á fundinum.

– Bæði StÍF og VÍF, sum høvdu endað í niðurflytingarbólkinum, tóku í prinsippinum undir við uppskotinum, men trupulleikin var tann, at hvørki Kyndil ella Tjaldur vóru møtt til fundin. Tískil helt fundarstjórin, at tað var skeivt at samtykja eitt slíkt uppskot, uttan at øll feløgini, sum uppskotið rakti, vóru við á fundi, sigur Jógvan Martin Mørk.

– Tí haldi eg eisini, at tað er skeivt av venjaranum hjá Kyndli at fara í miðlarnar og finnast at kappingini, tá ið hann bara kundi møtt á fundinum, har uppskot var frammi um at broyta kappingina, sigur kappingarstjórin.

### Fylgdi harraboðum

Formaðurin í HFS, Eivind Jacobsen, sigur aðrastaðnis her í blaðnum, at aðalfundurin hjá hondbóltssambandinum í fjør samtykti at broyta kappingina hjá kvinnum úr sjey liðum upp í átta lið, men hesi boð fekk Jógvan Martin Mørk ikki fyrr enn í septembur mánað, eftir at hann hevði lagt kappingina.

– Eg hevði lagt kappingina við sjey liðum, men fekk í seint í septembur mánað boð frá starvsnevndini um, at Tjaldur skuldi við, og at tað tískil vóru átta lið í kvinnukappingini. Aðalfundurin í fjør samtykti nevnliga nakrar bygnaðarbroytingar, sum hava við sær, at starvsnevndin hevur evstavaldið í HSF, og tí kann gera sum hon vil við at broyta í kappingini, sigur Jógvan Martin Mørk.

– Tì noyddist eg at leggja alt av nýggjum. Eg legði fyrst kappingina soleiðis, at hon endaði á páskum at kalla samstundis sum menninir, men hetta uppskotið innibar, at feløg noyddust til Suðuróyar at spæla mitt í viku, og tað bleiv ikki góðtikið, greiðir Jógvan Martin Mørk frá. Hann legði tískil kappingina av nýggjum, soleiðis at hon sær út sum hon ger í dag.

## ÍSB aftur til Íslands

**Í dag fara tríggir føroyskir borðtennisspælarar hjá ÍSB til Íslands at taka lut í íslendska meistaraskapinum í borðtennis fyri brekað**

ÍSB-ÍÐKARAR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Farna vikuskifti vóru tríggir ÍSB-svimjarar í Íslandi og tóku lut í íslendska meistaraskapinum í svimjing fyri brekað. Føroysku svimjararnir stóðu seg óvanliga væl og vunnu ikki færri enn seks heiðursmerkir. Tvey gullheiðursmerkir, trý úr silvuri og eitt úr bronsu.

Nú eru tað tríggir borðtennisspælarar hjá ÍSB, sum leita sær til grannatjóðina fyri vestan, har tey skulu royna seg í íslendska meistaraskapinum.

### Hava vant síðani á nýggjárinum

Tey trý, sum skulu til Íslands í dag, eru Maureen Garðshamar, Unn Mortensen og Tórður Hjalt Jacobsen. Kappingin verður leygardagin og sunnudagin, og sum áðurnevnt fara tey trý til Íslands í dag.

Spurningurin er so, um tey trý fara at standa seg eins væl og teir tríggir svimjararnir, sum komu aftur við fullari skjáttu av heiðursmerkjum.

# Albert aftur í B68

Fáur ivast í, at B68 er stóri favoritturin, tá landskappingin í aðru deild í fótbólti fer ígongd, og nú hava toftamenn enn einaferð styrkt um liðið.

Albert Sævarsson, sum eisini áður hevur vart B68-málið, kemur nú aftur til felagið. Albert varð í 2003 kosin sum besti málverji í landinum, men í fjør noyddist hann heim til Íslands av privatum ávum. Hann hevur hetta seinasta árið spælt við Grindavík í bestu íslendsku deildini.

### Real Madrid fall

Aftur í gjárkvøldi stóð Champions League fótbóltur á skránni, og aftur gjørdist talan um dramatiskr dystir, áðrenn tað stóð greitt, hvør eigur umboð í fjórðingsfinalunum í kappingini.

Serliga í Torino stóð nógv á, tá Real Madrid og Juventus noyddust út í longda leiktíð, áðrenn Juventus hevði vissað sær víðari luttøkuna. Eitt lítið korter fyri leiklok skoraði David Trezeguet til 1-0, soleiðis at samlaða úrslitið varð javnleikur. Í longdu leiktíðini stríddust bæði liðini, og dramatikkurin kom í hæddina, tá bæði Ronaldo og Tacchinardi vórðu riknir av vølli. Lítla løtu seinni skoraði Zalayeta avgerandi málið, soleiðis at Juventus vann samanlagt 2-1.

Á Highbury vann Arsenal 1-0 á Bayern München, men tað var ikki nóg mikið til víðari luttøkuna.

Liverpool vann 3-1 á útivølli móti Bayer Leverkusen, og í Monaco vann PSV Eindhoven 2-0.

Liðini í fjórðingsfinalunum eru sostatt Bayern München, Juventus, Liverpool, PSV Eindhoven, Lyon, Chelsea og Milan. Inter og Porto spæla ikki seinastu 1/8-finaluna fyrr enn 15. mars.